Flemming Raben, landsliðsvenjari:

## - Noyðast at arbeiða við tí kropsliga

**Venjarin hjá føroyska kvinnulandsliðnum, Flemming Raben, heldur tað verða umráðandi, at størri dentur verður lagdur á fysiska venjing innan hondbóltin í Føroyum**

LANDSLIÐSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Flemming Raben var fegin um dystirnar móti sterku íslendsku manningini, tí at dystirnir vóru eitt gott høvi hjá honum at síggja nakrar nýggjar spælarar royna seg í landsliðshøpi. Men landsliðsvenjarin heldur, at dystirnir móti Íslandi prógvaðu, at vit eiga at leggja størri dent á kropsliga venjing her heima, tí at okkara spælarar standa ikki mótstøðuleikarunum mát á kropsliga økinum.

### Ungt lið

Sjálvur helt Flemming Raben, at tað var ógvuliga sjónligt í dystunum móti ungu íslendsku manningini, at føroyska kappingin er liðug fyri umleið einum mánað síðani.

- Eg haldi, at tað sæst ógvuliga týðuligani, at okkara spælarar mangla taðnn seinasta neyvleikan í hesum báðum dystunum, og tað kemur sjálvsagt av, at teir ikki hava roynt seg í dysti í ein mánað. Hinvegin haldi eg, at í seinna hálvleiki av dystinum í Havn sunnudagin eru okkara spælarar væl við, og tá spæla tær fyri so vítt upp við íslendska liðið, segði Flemming Raben.

Føroyski landsliðsvenjarin viðgekk tó, at íslendska landsliðið var væl sterkari, enn hann hevði væntað, og hann hevði ikki væntað, at mótstøðan fór at verða so sterk. Flemming Raben sigur, at eftir hansara tykki er íslendskur kvinnuhondbóltur komin rættuliga langt.

Í sambandi við dystirnar móti íslendingum hava føroysku kvinnurnar eisini verið saman uttan fyri vøllin, og tað heldur Flemming Raben hevur sera stóran týdning.

### Miðvís venjing

Føroyska kvinnulandsliðið arbeiðir í løtuni fram ímóti enn eini Challenge Trophy Cup kapping, sum væntandi verður einaferð komandi vár. Flemming Raben, sum hevur tikið við landsliðsvenjarasessinum eftir Rógva Nielsen, sigur, at nú verður løgd ein miðvís venjingarskrá, sum teir leikarar, ið eru áhugaðir í at verða við í landsliðshøpi, skulu fylgja.

Hondbóltssambandið fer at koma við einum útspæli til, hvussu teir føroysku spælararnir hvør í sínum lagi kunnu arbeiða við kropsligari venjing, tí tað er serliga á hesum øki, at vit eru eftirbátar, heldur Flemming Raben.

Eisini heldur Flemming Raben, at tað er av stórum týdningi fyri føroyskan hondbólt, at okkurt verður gjørt fyri, at spælararnir eru virknir í eitt longri tíðarskeið, enn teir eru í løtuni. Sum nú er, liggur hondbólturin í Føroyum stillur alt ov leingi, og tað ber ikki til, um vit ætla at verða við í altjóða hondbólti, heldur Flemming Raben.



*Flemming Raben, landsliðsvenjari, heldur tað verða umráðandi, at okkurt verður gjørt fyri at føroyskir hondbóltspælarar eru í gongd ein størri part av árinum.*

21.05.05 Føroyar-Ísland 14-31
22.05.05 Føroyar-Ísland 14-26

# Skert føroyskt lið tapti greitt

**Eitt føroyskt kvinnulandslið í skerdari útgávu var greitt við undirlutan móti eini ungari íslendskari manning.**

LANDSDYSTIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Unga Rebekka Justinussen úr StÍF h.m. stóð seg væl í dystunum móti íslendsku kvinnunum um vikuskiftið.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Føroyski landsliðshópurin til dystirnar móti Íslandi um vikuskiftið var nógv broyttur í mun til tað liðið, sum stóð seg so væl í Italia fyri góðum ári síðani. Tey bæði avgjørdu oddaliðini í føroyskum kvinnuhondbólti nógvu seinnu árini, VB og Stjørnan, høvdu eingi umboð á liðnum, sum leikti móti Íslandi, og tí má staðfestast, at talan var um eitt skert føroyskt lið.

### Tempoið ov høgt fyri føroysku kvinnurnar

Størsti trupulleikin hjá teimum føroysku kvinnunum í dystunum báðum móti íslendingum, var høga ferðin á íslendska spælinum. Føroysku kvinnurnar høvdu ógvuliga trupult við at fylgja við íslendsku leikarunum, og serliga tungt var tað hjá okkara leikarum at skifta nóg skjótt úr álopi í verju.

Hetta kostaði mangan dýrt, tí ofta gingu tað bert fá sekund frá tí, at Føroyar høvdu mist bóltin í álopinum, til hann lá í meskunum aftan fyri annaðhvørt Tommu Petersen ella Guðrun í Lágabø.

Eisini á kropsliga økinum vóru okkara spælarar ikki eins væl fyri sum íslendsku kvinnurnar. Serliga var tað bakketan hjá Íslandi, sum var vælvaksin og sterk, og tað var tungt hjá føroysku verjuni at verja fyri, tá ið stóru íslendsku bakkarnir royndu at bróta ígjøgnum.

Tað sást eisini væl, at føroysku spælararnir ikki hava verið í dysti í drúgva tíð, tí neyvleikin og flytingarnar vóru ikki á tí støði, sum tær helst høvdu verið, um dystirnir høvdu verið, meðan heimliga kappingin var í hæddini.

### Framtíðina fyri sær

Sum áðurnevnt var íslendska liðið rættuliga ungt, men tað var tað føroyska so sanniliga eisini. Tí kann sigast, at føroyska liðið hevur framtíðina fyri sær, og at talan er um nógvar evnaríkar spælarar, er einki at taka seg aftur í. Eitt nú er unga Rebekka Justinussen úr StÍF framvegis úr unglingaspælari, men hon smæddist tó ikki burtur úr í dystinum móti Íslandi.

Tá ið liðið verður styrkt við nøkrum profilum úr ávíkavíst VB og Stjørnuni, er breiddin góð, og við miðvísari venjing og fleiri felagsvenjingum skal okkurt gott óivað spyrjast burtur úr.

### Hvar liggur feilurin?

Stóri spurningurin og stóra samrøðuevnið í sambandi við dystirnar hjá kvinnulandsliðnum, var tó, hví eingir spælarar úr VB og Stjørnuni vóru við.

Sum nevnt í blaðnum í vikuskiftinum var ein stórur partur av liðnum hjá Stjørnuni uttanlands, men tó ikki allar. Sosialurin hevur tó fingið uppspurt, at venjarin hjá Stjørnuni og fyrrverandi landsliðsvenjarin, Rógvi Nielsen, hevði meldað avboð vegna alt liðið hjá Stjørnuni til dystirnar móti Íslandi, hóast onkur spælari ikki var vitandi um tað. Somuleiðis hevði Rógvi sagt við fyrrverandi starvsfelagan á landsliðnum, Flemming Raben, at leikararnir úr VB ikki høvdu sýnt landsliðnum áhuga, men tað kendu VB-spælararnir sjálvar einki til. Tær hava ongantíð fingið nakra áheitan ella fyrispurning frá landsliðsvenjaranum ella HSF.

Flemming Raben hevur tikið orðini hjá Rógva fyri gott, og tí kann hann ikki lastast fyri, at VB og Stjørnan einki umboð høvdu í hópinum til dystirnar móti Íslandi. Danski venjarin hevur snøgt sagt fingi blóðskeiv boð frá fyrrverandi starvsfelaganum, sum hevur meldað avboð fyri leikarar, sum ikki vóru vitandi um hetta. Hetta ber ikki til, og tað má fáa avleiðingar innanhýsis í hondbóltssambandinum, at spælarar, sum eru áhugaðir í at spæla á landsliðnum, og sum ivaleyst kunnu gerast grundstuðlar á liðnum, ikki sleppa framat. Bara tí Rógvi Nielsen sigur við Flemming Raben, at tær ikki hava hug at spæla á landsliðnum.

Vit royndu bæði í vikuskiftinum og mánadagin at fáa fatur á Rógva Nielsen, men til fánýtis.